# Føroysk byggivinna komin til eina rundkoyring ella eitt vegamót? Tann mentala blokeringin

TOM SILVURDAL
verkfrøðingur



Byggivinnan má metast sum ein serføroysk vinna. Allar tær føroysku fyritøkurnar hava næstan allan sín umsetning frá heimamarknaðinum.

Hettar kann tykjast løgið, men um ein hyggur nærri at hesum fyribrygdi, er tað kanska ikki so løgið kortini.

Fyri at kunna reka eina byggifyritøku í dag krevst útbúgving sum t. d. verkfrøðingur, byggifrøðingur o.l.

Fyri at nema hesar útbúgvingar mugu okur av landinum. Til Danmarkar, gongur leiðin vanliga.

Sum øllum kunnugt koma mong av hesum aldrin heimaftur. Men tey sum koma, hava øll eina vón um, at nú skulu tey endiliga heim til Føroyar at seta búgv, stifta familju og annars gera sítt til, at menningin av okra kæra heimlandi, kann halda áfram.

Hesa vón hevði/hava eisini okur sum fingið útbúgving innan byggivinnuna.

Hugurin var innstillaður upp á at skapa eitt lív saman við familjuni í Føroyum.

Tí er tað mín persónliga áskoðan, at orsøkin til, at tann føroyska byggivinnan er ein serføroysk vinna burturav, skal finnast í teirri mentalu innstillingini hjá okkum føroyingum.

Okur eru mentalt komnir heim fyri at vera. Okur vilja ikki burtur frá Føroyum, men ynskja bert at liva og virka her. Tað er her broyting má koma í, um føroyskar byggifyritøkur skulu halda áfram, at mennast.

Føroysk byggileiðsla hevur nomið sær útbúgving í Danmark.

Donsk byggifeløg hava allan heimin sum marknað. So tað kann ikki sigast, at okur her heima ikki hava nomið okkum tann rætta førleikan fyri at kunna gera okkum galdandi á tí útlendska marknaðinum.

Hettar hava danir prógvað fyri okkum, hvat ið ein donsk útbúgving kann nýtast til.

**Fíggjarkreppan og byggivinnan**

Seint á heystið 2008 kom henda kreppa til Norðurlond, og harvið eisini til Føroyar.

Í Føroyum hevur henda kreppa viðført, at nógv fólk innan byggivinnuna eru vorðin arbeiðsleys.

Byggiharrar sum t. d. Tórshavnar Kommuna, hava fingið fíggjarligar trupulleikar, orsakað av teirra nógvu byggiverkætlanunum.

Stór byggiætlan sum t.d Skúlin á Argjum, er ikki veruliga byrjaður enn.

Sáttmáli hevur bíðað eftir undirskrift í fleri mánaðir. Orsøkin sigst vera væntandi fígging.

Hetta er ikki nakað eindømi í dag, men tey fíggjarligu útlitini fyri Føroyar, eru vorðin meira døpur, og tað er skylda hjá okra fólkavaldu, at endurskoða framtíðarætlanir.

Hettar kemur et merkja afturgongd fyri byggivinnuna, og fer arbeiðsloysi óiva at vaksa nógv í 2009.

Fyri at tolma hesari afturgongd, hava okra grannalond (undantikið Ísland ) ætlanir um at seta sokallaðar Vakstrarpakkar í umfar.

Noreg hevur longu framt ein vakstrarpakka fyri áleið 20 mia.nkr.

Danmark fer væntandi seinni í vár at samtykja ein pakka á umleið16 mia.d.kr.

**Hvat gera føroyskir politikkarir**

Fer ætlanin hjá fíggjarnevndini at seta pening í umfar, javnt kring landið, at hjálpa til, at halda føroyingar í arbeiði í 2009?

Kann tað at skriva ein sáttmála við íslendska byggifyritøku uppá 27 mio. kr, sigast at vera við til, at halda føroyingar á arbeiðsmarknaðinum?

Kann ætlanin, um at skriva ein sáttmála áðrenn 1. mars við TG-Verk, um ger av Ellis og røktarheimið og Økisdepli fyri sinnisveik í Vági, á umleið 57 mio. kr, metast at vera við til at halda føroyingar á arbeiðsmarknaðinum?

Hetta eru arbeiði fyri 84 mio.kr, sum tað almenna Føroyar sendir av landinum, longu við ársbyrjan 2009.

Hvussu man restin av árinum fara at hilnast? Væntandi aðrar 200-300 mio.kr sendar av landinum seinni í 2009?

Almennu Føroyar, land og kommunur, siga seg spara pening á henda hátt.

Álvaratos, hevur almennu Føroyar ongan samfelagsbúskaparfrøðing í starvi?

At almennu Føroyar flyta 84 mio. kr beinleiðis av landinum, kemur at svara til, at okur hava góðtikið, tað samfelagsliga nógv dýrasta tilboðið fyri Føroyar.

Hetta má Sigurd Poulsen, ella Herman Oskarson, kunna staðfesta, um okkurt fjølmiðlafólk tímir, at spyrja teir!

Hvussu sær handilsjavnvágin millum Føroyar og Ísland út, anno 2009.

Hvussu munna útlitini verða næstu árini?

Væntandi eitt stórt undirskot fyri Føroyar, á handilsjavnvágini við Ísland.

Kann Føroyar klára hettar handilsundirskot, uttan at arbeiðsloysi fer at vaksa, í Føroyum?

Føroyar hava samtykt at hjálpa okra granna. Men fer Føroya Landstýri at hjálpa sínum egnu borgarum, sum fara at gerast arbeiðsleysir, orsakað av tí førda politikki her heima???

Ella skal tað verða, sum í 1992, hvør man klára seg sjálvan sum frægast?

Tað er eitt sterkt land, sum megnar at hjálpa borgarum í einum øðrum landi, men tað er samstundis eitt vánaligt land, sum ikki klárar, at útvega arbeiði til sínar egnu borgarar og fyritøkur.

Tað er upptil okra fólkavaldu at skapa karmar fyri, hvat slag av samfelag, okur skulu hava í Føroyum.

Skal ein ávísur vinnubólkur, gjalda rokningina fyri, at Føroyar skulu hjálpa grannalandinum, ella vil Føroya Landstýri skipa fyri at smíða karmar, sum kunna tryggja at føroyskar fyritøkur og føroyingar, kunnu sleppa undan hesi rokning - arbeiðsloysi og húsagangi.

Føroysk byggivinna á einum vegamóti.

Tíðin er komin til, at føroyskar byggifyritøkur mugu fáa etablerað virksemi í okra grannalondum. Hetta mugu tær hava hjálp til, frá Vinnumálaráðnum, fíggjarveitarum, íløgufeløgum, Framtaksgrunninum, Vinnuhúsinum v.m.

Løtan tykist vera tann rætta at gera hettar, nú í okur síggja niðurgongd herheima. Samstundis sum okra grannalond, samtykkja Vakstrarpakkar fyri milliardir av krónum.

Vónandi er onkur lesari av hesi grein, sum kann taka stig til, at fremja mína áheitan í verki.

Um ongin tykist vera, vil eg hervið heita á Føroya Løgmann, um at taka stig til ætlanina.

Ein vinna má hava vón og áræði, umframt framskygni. Sum altíð má borga fyri teirri gleði til skapan, sum tað at kunna byggja altíð vil vera.

Verandi vinna tykist vónleys, stuttskygd og uttan evnini til at finna eina kós, burturúr verandi støðu.

Henda kann ikki halda fram, og hettar kann Føroyar ikki liva við.

Við vón um broyting, Føroya landi og føroyskari byggivinnu at frama.

# Ungdómsútvarp Føroya?

ELIN HENRIKSEN

Lat meg viðganga beinanvegin, at eg nú eri um miðjan aldur, so at siga javngomul við Útvarp Føroya. Eitt tað fyrsta útvarpsminnið hjá mær er eitt spennandi hoyrispæl í barnaútvarpinum um Loyndarmálið, sum Sú, Rók og Dávid funnu útav. Tá vóru ikki nógvar føroyskar barnabøkur, so tað var sera forkunnugt at hoyra eina góða søgu sum hesa. Annars sendi útvarpið ikki so leingi tá, fyrst í sekstiárunum. Har var ein tími um morgunin og ein á middegi, og so eitt sindur longri um kvøldið. Týskvøld var barnasending; men umframt hana minnist eg væl tey frálíku hoyrispølini, sum ofta vóru á skránni leygarkvøld. Hetta var, áðrenn ungdómsmentanin hevði breitt seg út yvir alt – tey ungu, sum vildu hoyra nútímans tónleik, máttu klára seg við radio Luxemburg.

Men fólk vóru sum heild góð við útvarpið, bæði lurtarar og tey, sum gjørdu sendingar. Hetta, sum eg nú sigi, kann eg sjálvsagt ikki prógva, men eg haldi ikki, at eg fari skeiv, um eg sigi, at tað heldur var eldhugur enn peningalig løn, sum fingu fólk uttan fyri stovnin at vera við í sendingum. Fólk mintust, hvussu tað var ikki at hava nakað føroyskt útvarp. Heldur ikki vóru so nógvir aðrir miðlar, hvørki sjónvarp ella alnót. Tá ið Útvarp Føroya ikki sendi, stóð sum oftast á norðmanninum ella Tórshavnar Radio.

Vit skulu ikki venda aftur til fortíðina; og eitt nú sjálvboðið arbeiði er nakað, sum eyðkennir ta fyrstu tíðina í nógvum nýstovnaðum feløgum, tiltøkum og stovnum – seinni hava professionalisman og tað lønta arbeiðið meira at siga; og soleiðis eigur tað helst at vera. Hetta nevni eg, fyri at vit kunnu hava í huga, at tað eru hesi fólkini, sum vóru við til at taka undir við tí fyrstu byrjanini av Útvarpi Føroya, sum nú eru teir gomlu lurtararnir. Hesa kenslu av at vera góð við Útvarpið kunnu tey ungu av góðum grundum ikki kenna – hjá teimum er Útvarpið ein sjálvfylgja og bert eitt av mongum tilboðum bæði í radio, sjónvarpi og á alnótini. Og tað tykist, sum er støðan sum kappingarneyti tikin fram um støðuna sum tað almenna útvarpið í hugaheiminum hjá teimum, sum nú avgera innihaldið í Útvarpi Føroya.

Eitt alment útvarp má vera fyri allar lurtarar, hvussu fjølbroytt vit enn eru. Eisini fyri allar aldursbólkar. Og tað er serliga her, at Útvarp Føroya við síni núverandi manning og skrá fullkomiliga tykist at hava gloymt, at tað eisini eru gomul og tilkomin fólk í lurtaraskaranum.

Nú hevur mest verið at hoyrt um endursendingina av morgunlestrinum – nakað, sum er rættiliga óviðkomandi fyri yngru ættarliðini, sum annaðhvørt kunnu lurta tíðliga um morgunin, fara á alnótina ella als ikki lurta. Tey gomlu harafturímóti hava kent endursendingina av morgunlestrinum sum sína sending og hava trúliga lurtað og sitið við sálmabókini og sungið við – ikki bara á ellis- og røktarheimum, men eisini heima við hús.

Tað hevur verið nevnt, at grundin til, at endursendingin av morgunlestrinum mátti strikast, var at halda fast við lurtararnar allan fyrrapartin, so teir ikki skiftu til aðra rás. Her verður sjálvsagt fyrst og fremst hugsað um lurtarar í yngru ættarliðunum. Men hvussu er støðan hjá teimum gomlu og stórum parti av teimum tilkomnu? Tað kann gott vera onkur sending í Útvarpinum, sum hevur áhuga, men ímillum innsløgini verður spældur tónleikur, sum í oyrunum á flestøllum gomlum og nógvum tilkomnum ljóðar so andskræmiliga, at tey skunda sær at sløkkja – og hoyra so ikki restina av sendingini, ið kanska annars var áhugaverd. Hvør munur er á at missa lurtarar á henda hátt, og so av, at onkur skiftir rás vegna eina endursending av morgunlestri? Kanska tann, at hinar rásirnar spæla sama slag av tónleiki, so at radio verður sløkt, í staðin fyri at skift verður til aðra rás? Sum gamal ella tilkomin lurtari situr tú eftir við teirri kenslu, at tey, sum leggja skránna, hugsa sum so: Vit leggja einki í, um tey gomlu og tey tilkomnu "skrúva av" útvarpinum, tí tey fara ikki yvir til hinar rásirnar, men tey yngru skifta til Rás 2, og tað má ikki henda.

Hyggja vit at, hvørjar tónleikasendingar eru horvnar úr skránni, so eru har lutfalsliga nógvar sendingar, ið hava havt lurtarar millum tilkomin og gomul: Tónleikasendingarnar hjá Ova Olsen, Leygarmorgun í studio 5 við Arna Thomsen, Harmonikutónarnir hjá Flóvin Jacobsen og Menuettin við Jóannes S. Hansen. Saknur er í teimum! Ein lítil sending við klassiskum tónleiki er komin í staðin, men við so ringari senditíð, at tað næstan kann gera tað sama.

Men fyri ikki bert at finnast at, fari eg at takka Útvarpinum fyri, at Jónleif Johannesen er sloppin at gera sendingar um føroyskan dans. Tað var tíð uppá, at kvøðing og dansur aftur fingu rúm í almenna mentanarberanum!

Eitt heilt annað fyribrigdi, sum stuðlar fatanini av Útvarpinum sum Ungdómsútvarp, er mátin, sum ensk tala verður send í eitt nú tíðindasendingum. Er ein samrøða við ein persón, sum tosar enskt, eitt nú ein íslending, so verður hetta sent beinleiðis í tíðindunum, uttan at verða týtt til føroyskt.

Hjá teimum yngru ættarliðunum er tað púra sjálvsagt at skilja og tosa enskt. Men hjá fólki oman fyri eini 45 ár er hetta ikki so. Kanska lærdu vit eitt sindur av enskum í skúlanum, men enskt var ikki fyrsta fremmandamál og varð als ikki nýtt í gerandisdegnum. Ein rættiliga stórur partur av tilkomnum og gomlum føroyingum skilja ikki nóg væl enskt til at fáa nakað sum helst burturúr einari enskari samrøðu í eini tíðindasending! Eftir situr tú bara við einari kenslu av, at nú var tað aftur "Ungdómsútvarp Føroya", sum sendi.